VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í útsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Um kvøldið regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, týsnáttina minni vindur. Mánadagin ælingur, men týsdagin yvirhøvur turt. Hitin millum 6 og 10 stig.

Gamla reinsarí ein perla

Umfatandi umvælingin av Gamla reinsarínum er um at verða liðug uttan, og húsini eru aftur við at gerast ein perla í Havnini

UMVÆLING
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Gamla reinsarí er vorðið ógvuliga snøgt uttan. Nú verður farið at umvæla innan

Mynd: Jens Kristian Vang

Síðani einaferð tíðliga í summar hava menn tikist við at umvæla Gamla reinsarið í Tórsgøtu. Hetta hevur verið eitt ógvuliga umfatandi arbeiði, tí húsini stava frá áleið ár 1700, og avgjørda ynski hevur verið at varðveitt tey í uppruna líki.

Hetta hevur merkt, at bjálkar hava verið feldir inn í gomlu uppstillingina, og hetta hevur bæði kravt gott handalag og nógva tíð.

Stillands hevur verið sett upp og veggur fjalt síðuna út móti Tórsgøtu í longri tíð, men fyrst í vikuni varð veggurin aftur niðurtikin, og fólk kunnu nú síggja, hvussu snøgt arbeiði er gjørt við at restaurera Gamla reinsarí

Men hetta er bert fyrsti partur av einari longri og meiri umfatandi ætlan. Tí húsini skulu eisini gerast í stand innan, og tað arbeiðið fer í gongd, nú liðugt er at seta í stand uttan..

Og talan er veruliga um eina longri verkætlan. Heðin Mortensen, borgarstjóri, roknar við, at tað fara at ganga eini tvey ár, áðrenn Gamla reinsarí verður í tipp-topp standi. Og tá verður so uppgávan at finna út av, júst hvat bygningurin skal nýtast til.

- Talan verður um mentanarlig tiltøk av einumhvørjum slagi, so mikið liggur fast. Men júst hvat er ikki endalig støða tikin til enn, tó at møguleikarnir eru mangir, sigur Heðin Mortensen.

Meiri verður at frætta um ætlanina við Gamla reinsaríi í morgin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	--
Qaqortoq	10
Ammassalik	2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	1
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	9
London	13
Tromsø	--
Bergen	7
Oslo	--
Stokkhólm	11
Keypmannah.	12
Helsinki	5
Moskva	9
Berlin	17
Warzawa	17
Kiev	16
Bukarest	17
Paris	15
Madrid	21
Róm	24
Malorca	19
Athen	22
Malta	21
Tunis	24
Beijing	15
New Dehli	28
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	20
New York	21
Miami	30
Los Angeles	18
Meksikobýur	24
Panama	29
La Paz	8
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1023 hPa. yvir Íslandi fer í landsynning. Eitt lágtrýst, 979 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.



Í dag:
Lágtrýstið við Ísland fer eystureftir og kuldabrúgvin í landsynning úr Føroyum fer í landsynning.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 30/10 kl. 06^{00} – 31/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 8,0 mm – mált frá 20/10 kl. 06^{00}– 21/10 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í oktober: 88,0 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum

7. november
Brekkubrothers

15. november
Heilsuhjálparfelagið

21. november
Musikkskúlin - Big Band

22. november
7b í Hoyvík á hundasleðu í Grønlandi

23. november
Demokratia

28. november
Landsbankin

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

Lesið
Sosialin
-tað
loysir
seg

VESTFALLSKYRRINDI

26. oktober Fullmáni/Mánin næstur jørðini
1. november Seinna kvarter
9. november Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
1. Nov.	-	12.09	11.09	23.47	11.24	-	01.28	14.09	02.28	15.09	10.24	23.02	09.24	22.02	-	12.24	00.43	13.24	11.54	-	00.28	13.09
2. Nov.	00.47	13.25	-	12.25	00.02	12.40	02.47	15.25	03.47	16.25	11.40	-	10.40	23.03	01.02	13.40	02.02	14.40	00.32	13.10	01.47	14.25
3. Nov.	01.48	14.11	00.48	13.11	01.03	13.26	03.48	16.11	04.48	17.11	00.03	12.26	11.26	23.47	02.03	14.26	03.03	15.26	01.33	13.56	02.48	15.11
4. Nov.	02.32	14.54	01.32	13.54	01.47	14.09	04.32	16.54	05.32	17.54	00.47	13.09	-	12.09	02.47	15.09	03.47	16.09	02.17	14.39	03.32	15.54
5. Nov.	03.13	15.33	02.13	14.33	02.28	14.48	05.13	17.33	06.13	18.33	01.28	13.48	00.28	12.48	03.28	15.48	04.28	16.48	02.58	15.18	04.13	16.33